# Gomul jól í Heiðunum

**Aftur í ár eru "Gomul Jól í Heiðunum" á skránni í Runavík. Hugnaliga tiltakið er sera fjølbroytt við nógvum ymiskum á skránni**

JÓL
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*



*Í Gamla Handlinum hjá Olivari hevur Orkis nógv spennandi jólaprýði til sølu*

Tá ið tú nærkast økinum, har Gamli Handilin hjá Olivari er, sært tú perur og jólatrø, og hugnaligur jólatónleikur hoyrist úr jólakaféini, sum er á loftinum í einum gomlum neysti. Her eru "Gomul Jól í Heiðunum".

Tiltakið var roynt á fyrsta sinni í fjør, og var tað so væl umtókt, at tað aftur er á skránni í ár. Tiltakið hevur verið opið hvørt vikuskifti síðani 1. sunnudag í advent, og jólavikuna verður opið hvønn dag til og við hósdegnum 22. desember.

Fert tú ein túr inn í hugnaliga Gamla Handilin hjá Olivari, hevur blómuhandilin Orkis eina rúgvu av jólaprýði til sølu. Har eru ljós, stakar, vættrar, jóladekoratiónir og mangt annað. Jólatrø fáast eisini til keyps uttanfyri. Harumframt er eitt rúm í handlinum, har ymisk tiltøk hava verið, millum annað bar til at taka jólamyndir av børnunum eitt vikuskifti, Andlitsmáling onkrar dagar og í løtuni hevur LR ymiskar vørur til húðrøkt til sølu.

Økið er vakurt pyntað við perum og jólatrøum, og skótarnir hava sett raftir upp á økinum. Teir skipa fyri hugnaligu jólakaféini á neystaloftinum, har tú kanst keypa heitt gløgg, kaffi, vaflur, eplaskivur og annað gott, meðan tú lurtar eftir jólatónleiki.

Í dag verða jólakaféin á Neystaloftinum og Gamli Handilin opin frá kl. 14:00 til 18:00. Annars verður opið hvønn dag, meðan tiltakið er, frá kl. 16:30 til 19:00.

## Nógvur tónleikur

Í jólakaféini hjá skótunum verður tónleikur at hoyra hvønn dag. Í dag, leygardagin 17. desember, verður hornblástur við Áka Leitisstein Hansen og øðrum kl. 17:00. Í morgin, 4. sunnudag í advent, verður violinspæl at hoyra kl. 18:00. Mánadagin fara børnini úr Útistovu í Barnagarðinum á Mýrunum at syngja jólasangir kl. 16:30, og týsdagin fer 12 ára gamla Bjørt Simonsen at spæla á sello kl. 17:00. Hósdagin 22. desember, sum er síðsti dagur, áðrenn tiltakið endar, spæla Angelica Nielsen og Tóri Restorff Jacobsen á violin og sello kl. 17:00.

## Spennandi hjá børnunum

Í ár er eisini skipað fyri eini teknikapping fyri børn. Evnið er "Jól í Runavíkar kommunu", og øll børn kunnu lata tekningar inn í Gamla Handlinum hjá Olivari ella í jólakaféini. Seinasta freist at lata tekningar inn er sunnudagin 18. desember kl. 19:00. Vinningarnir eru gávukort frá Handilsmiðdeplinum í Runavíkar kommunu. Millum jól og nýggjár verður ein framsýning við øllum myndunum í blómuhandlinum Orkis á Glyvrum.

Sunnudagin 18. desember verður andlitsmáling við Inger Olsen í Gamla Handlinum hjá Olivari.

## Jólaskipið til Runavíkar

Børnini kunnu eisini gleða seg til mikudagin 21. desember, tí tá kemur jólaskipið til Runavíkar. Kl. 17:00 leggur jólaskipið leggur at í bátahylinum, sum er beint við økið, og tá verður skotið við fýrverki. Umborð á skipinum verða jólamenn, vættragentur, og kanska okkurt vættrabarn. Jólamenninir fara at syngja saman við børnunum, og vættragenturnar fara at dansa onkran vættradans. Tey fara sjálvandi eisini at hava okkurt gott at bjóða børnunum, sum kunnu gleða seg til, at vinnararnir av teknikappingini verða kosnir ta løtuna.

Handlarnir í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar Kommunu hava leingi opið í jólavikuni. So um tú kundi hugsað tær ein góðan dag, er tað eitt gott hugskot at fara ein túr til "Gomul Jól í Heiðunum". Tá ið jólainnkeypið er liðugt, kanst tú so leggja leiðina ein túr til hugnaligu og spennandi jólabygdina Æðuvík, so ert tú í røttum jólahýri.



*Í hugnaligu jólakaféini á neystaloftinum sita nógvar fittar mýs og hugna sær í krókunum*



*Mikudagin 21. desember kemur jólaskipið á vitjan í Runavík. Við umborð verða jólamenn, vættragentur, og kanska okkurt vættrabarn*